


*Hóast tað leikaði sera javnt á í dystinum millum Fleyr og Mjølnir í gjárkvøldið, hevði Mjølnir munin og er nú nærri einum FM-finaluplássi enn nakrantíð*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Mjølnir er nú næstfremst

**FLOGBÓLTUR** Við sigrinum á Fleyr í gjárkvøldið fór Mjølnir fram um SÍ á stigatalvuni, og klaksvíkingarnir hava nú góðan møguleika at koma í FM-finaluna ímóti ÍF

**Hilmar Jan Hansen**

– Hesin sigurin hevði nógv at siga fyri okkum, og vit hava góðar møguleikar at koma í finaluna. Vit hava ofta gott tak á Fleyr, og hóast teir vóru øgiliga uppsettir í kvøld, høvdi vit munin, segði liðformaðurin hjá Mjølnir, Thorvald Danielsen tá 3-1 sigurin á Fleyr var veruleiki.

Talan var um ein fínan flogbóltsdyst í Gundadalshøllini í Havn, har menn báðu megin netið løgdu heilhjartað til brots. Liðini vóru sera jøvn, og ofta skiftust tey um at vera á odda í settunum. Og tað segði kanska alt, at Mjølnir skuldi ígjøgnum ikki færri enn fimm sett- og dystarbóltar í fjórða setti, áðrenn sigurin kom til høldar.

Tey bæði fyrstu settini byrjaði Mjølnir betur og var á odda, men so kom Fleyr afturíaftur. Í tí fyrsta settinum eydnaðist Fleyr at koma framum, hóast Mjølnir var á odda 23-22, og Fleyr vann settið 26-24. Hinvegin sá annað sett mestsum avgjørt út ta einu løtuna, tá Mjølnir var frammanfyri 16-9, men so kom Fleyr sterkt aftur og fór framum síðstu løtuna. Mjølnir hevði settbólt við 24-22, men servaði í netið, og avgerðin fall ikki fyrr enn tað bleiv 29-27 til Mjølnir.

Triðja sett var ikki so javnt sum hini, og tað vann Mjølnir 25-18, men í fjórða setti vóru liðini púra jøvn til tað allarsíðsta. At tað var Mjølnir, sum alla tíðina ímóti endanum vann sær møguleika fyri sett- og dystarbóltum, tardi helst meira upp á kreftirnar hjá Fleyr, sum at enda mátti lúta.

– Nú verður tað eitt sindur trupult at røkka finaluna, tí Mjølnir fer tvey stig fram um okkum og eigur ein dyst á, so tað verður hart, skulu vit fáa teir aftur. Hetta var nokk tann dysturin, ið var avgerandi fyri, um vit ordiliga skuldu vera við ella ikki. Tí var tað eyka keðiligt, at vit skuldu tapa hann, segði hevarin hjá Fleyr, Hans Fróði Jensen.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Yvir 100 lið á Giljanesi

**FLOGBÓLTUR** Um vikuskiftið var árliga Dráttur-kappingin í flogbólti á Giljanesi, og hóast veðrið ikki var til vildar, møttu tey flestu av tilmeldaðu liðunum

**Hilmar Jan Hansen**

Tilsamans 113 lið høvdu meldað seg til Dráttur-kappingina, men hóast nøkur hildu seg aftur – helst orsakað av vánaliga veðrinum fríggjadagin – vóru yvir 100 lið við í kappingini.

Kappingin byrjaði fríggjakvøldið hjá unglingum og helt fram leygarmorgunin. Ikki fyrr enn hálvan tíma eftir midnátt leygarkvøldið var síðsti vinnarin kosin.

Hjá kvinnuunglingunum vann KÍF, TB var nummar tvey og Fleyr nummar trý, og hjá mansunglingunum gjørdi TB bart, tí a-liðið vann og b-liðið gjørdist nummar tvey, meðan ÍF fekk triðjaplássið.

Fleyr vann kappingina hjá gentum 14 ár framman fyri ávikavist Drátt og Ternuna, og hjá dreingjum 14 ár vann SÍ, meðan Ternan bleiv nummar tvey og Dráttur nummar trý. Hjá gentum 12 ár vann TB a, Dráttur bleiv nummar tvey og TB b nummar trý, og hjá dreingjum 12 ár vann SÍ, TB bleiv nummar tvey og ÍF nummar trý.

Umframt øll hesi vóru 50 lið í Kidsvolley-kappingini, har tey ikki spæla um plaseringarnar sum hini, tí har eru øll vinnarar, sum eru við.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# FM-crossrenning í Hoydølum




*Loftmynd av renniteininum í Hoydølum í føroyameistarakappingini í crossrenning, sum verður leygardagin*

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR** Fyrrapartin leygardagin verður føroyameistarakapping í crossrenning í Hoydølum, eftir at henda kapping í áravís hevur verið oman fyri ítróttarøkið á Svangaskarði

**Hilmar Jan Hansen**

Frælsur Ítróttur Føroya, sum skipar fyri FM-renningini, hevur valt at skift teinin til crossrenningina á Svangaskarði út við ein nýggjan tein í Hoydølum í teirri vón, at kanska fleiri rennarar fara at halda seg framat. FM-kappingin í crossrenning byrjar klokkan 11 leygarmorgunin og varir í ein góðan tíma, og runnið verður á stóru, vøkru fløtuni og niðan í viðarlundina, tó bert niðan fyri Hvítanesvegin.

Umhvørvisstovan varðar av stórum parti av renniteininum, og tey fegnast um, at vakra økið eisini kann nýtast til slík endamál. Hetta er fríøki, sum nógv fólk ganga túrar á, men hesa løtuna, meðan renningin er, hava rennararnir fyrsta rætt til gøturnar. Tí verður heitt á fólk við barnavogi ella hundi at ansa væl eftir ikki at koma inn á kappingarøkið.

## Níggju ymsir bólkar

Kappast verður í tilsamans níggju bólkum, sum eru gentur og dreingir, fødd millum 1997 og 1999, kvinnu- og mansunglingar, føddir millum 1994 og 1996, opin bólkur hjá kvinnum og monnum, fødd í 1993 ella áðrenn, veteranar hjá kvinnum og monnum, fødd millum 1956 og 1965, og superveteranar hjá monnum, ið eru føddir í 1955 ella áðrenn.

Gentur og dreingir renna tvey umfør, svarandi til hálvantriðja kilometur, kvinnu- og mansunglingar renna trý umfør ella umleið fýra kilometrar, og øll hini renna seks umfør, sum er nakað minni enn átta kilometrar. Trý tey fremstu í hvørjum bólki fáa FM-heiðursmerki.

Tilmeldingarfreistin er úti fríggjakvøldið klokkan 21, og tilmeldingin fer fram á heimasíðuni renn.ro. Rennararnir kunnu skifta í umklæðingarrúmunum í Studentaskúlanum, har startnummur kunnu heintast frá klokkan 10 leygarmorgunin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 16 | 14 | 2 | 44 | 12 | 32 | 18 |
| 2 | Mjølnir | 15 | 9 | 6 | 30 | 22 | 8 | 11 |
| 3 | SÍ | 15 | 9 | 6 | 34 | 19 | 15 | 10 |
| 4 | Fleyr | 16 | 7 | 9 | 24 | 33 | -9 | 9 |
| 5 | TB | 16 | 0 | 16 | 2 | 48 | -46 | 0 |

**Fleyr-Mjølnir 1-3** (26-24, 27-29, 18-25, 27-29)